# Skjalayvirlit til umsókn um skeinkiloyvi - **Nýggj loyvi**

Umsøkjari:

| | |
|---|---|
| **1) Gistingarhúsvirksemi** | ☐ |
| **2) Matstovuvirksemi** | ☐ |
| **3) Kafévirksemi** | ☐ |
| **4) Diskoteksvirksemi** | ☐ |
| **5) Vertshúsvirksemi** | ☐ |
| **6) Mentanarligt virksemi** | ☐ |

***Viðmerking: Set í minsta lagi ein kross í nr. 1-6***
*Skeinkiloyvi eru treytað av slag av virksemi, sum farið verður undir. Virksemi, nevnt í nr. 2-3, krevur løggilding frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Virksemi, nevnt í nr. 4-6, krevur skráseting á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.*

☐ **1. Umsókn um skeinkiloyvi (innan- og uttandura)**
***Viðmerking:*** *Umsóknarblað fæst frá Loyvisnevndini*

☐ **2. Møgulig umsókn um matstovuloyvi**
***Viðmerking:*** *Umsóknarblað fæst frá Loyvisnevndini*

**Saman við umsóknini skulu leggjast hesi skjøl:**

☐ **3. Ársroknskapur (seinast grannskoðaði) ella fíggjarætlan fyri komandi ár**
**Viðmerking:** Verður virksemið lagt í eitt longu stovnað felag, skal ársroknskapur leggjast við umsóknini. Er talan um nýtt virksemi, skal fíggjarætlan leggjast við umsóknini.

☐ **4. Skrásetingarskjal úr Vinnuskránni**
***Viðmerking:*** *Skrásetingarskjalið fæst frá TAKS*

☐ **5. Tekningarútskrift**
***Viðmerking:*** *Tekningarútskriftin fæst frá Skráseting Føroya.*

☐ **6. Váttan frá TAKS um persónar og felagið ikki er í eftirstøðu**
***Viðmerking:*** *Váttanirnar fáast frá TAKS.*

☐ **7. Avrit av dópsbrævi hjá umsøkjara og leiðara / ella avrit av passi, koyrikorti, navnabrævi**
***Viðmerking:*** *Umráðandi er, at originalurin ikki verður sendur inn.* ***GG:*** *Umsøkari og/ella leiðari skulu vera eldri enn 25 ár.*

☐ **8. Brunaváttan og umhvørvisváttan frá kommununi**
***Viðmerking:*** *Kommunan skal brunagóðkenna hølini. Partur av brunagóðkenningini er at áseta mest loyvda tal av gestum á staðnum. Kommunan skal eisini umhvørvisgóðkenna virksemi, t.e. at virksemið er í samsvari við galdandi umhvørvisreglur. Umsøkjarin skal sjálvur venda sær til kommununa fyri at fáa nevndu góðkenning og váttan.*

☐ **9. Løggildingarváttan ella skrásetingarskjal frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni**
***Viðmerking:*** *Er talan um virksemi, nevnt í nr. 2-3, skal virksemið løggildast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Er talan um virksemi, nevnt í nr. 4-6, skal virksemi skrásetast á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Umsøkjarin skal sjálvur venda sær til Heilsufrøðiligu starvsstovuna fyri at fáa annaðhvørt løggildingar- ella skrásetingarskjal.*

☐ **10. Avrit av almennum loyvi frá politinum.**
***Viðmerking:*** *Er virksemið fevnt av nr. 4-6 omanfyri, krevst alment loyvi frá politinum. Søkjast skal beinleiðis til politiið.*

**Loyvisnevndin fyllir út:**
1) Umsóknin send til ummælis hjá politinum (dato): ☐